# Fimtan tríburðar hittast




*Av teimum 5 tríburðapørunum í Føroyum eru teir í Fuglafirði yngstir. Teir komu til verðina í 1998. (F.v.) Teodor, Birgir og Tórður. Foreldur teirra eru, Jónfríð og Dia Jacobsen*

**Leygardagin var »tríburðatreff« í Vestmanna skúla. Tá hittust tey fimm tríburðapørini í Føroyum at hugna sær saman við foreldrum og systkjum**

TRÍBURÐAR
*Orð:Rúna Sivertsen*
*Myndir: Jens K. Vang*
*runa@sosialurin.fo*

Tann 7. oktobur 1965 var stórur dagur í Føroyum. Tá fingu Judith og Ólavur Nolsøe í Dali tríburðar. Hetta vóru fyrstu tríburðar í Føroyum - ið menn vita um - sum komu vælskapt í verðina.

Síðani hava 4 onnur føroysk tríburðapør sæð dagsins ljós. Teir yngstu vórðu føddir í 1999.

- Tað er vorðið alt meiri og meiri vanligt at gera stevnur av øllum ymiskum slagi, eitt nú tvíburðastevnur og mammubólkar. So hví ikki eisini ein tríburðastevna, sigur Dia Jacobsen í Fuglafirði, sum tók stig til at savna tríburðarnar.

Tríburðarnir og familjur teirra hittust í skúlanum í Vestmanna seinasta leygardag.

- Tað var sertakliga hugnaligt, og vit funnu beinanvegin saman, bæði vaksin og børn, sigur Dia.

Hann sigur, at tey hava sjálvsagt felagsroyndir at skifta orð um, so tímarnir fuku avstað. Øll høvdu okkurt til matna við sær, og borðreitt varð við øllum møguligum góðum.

Til hetta serstaka høvið, hevði ein av tríburðamammunum, Tove Jacobsen úr Vestmanna, yrkt ein sang.

- Hetta var fyrsta tríburðastevna í Føroyum, men verður avgjørt ikki tann seinasta, siga fyriskipararnir.

Og hvør veit - tann 7. oktober 2005 fer kanska ikki at fara so stillisliga aftur við borðinum.

Livst so spyrst.





*Um góð tvey ár verða 40 ár, síðani tríburðarnir úr Dali sóu dagsins ljós. (F.v) Gunnar, Hedvig og Julian*



## Tríburða-sangur

***Lag: Sára***

Úr ymsum hornum koma vit til hugnaløtu her.
Vit hava nakað saman øll, sum jú so serstakt er.
Vit eru født í stóran flokk og kenna ikki tað
at vera einabarn, um onkuntíð vit ynkstu tað.

Trý-eini - trý-eini
tað eru vit - tríburðar eru vit

Í sekstifimm, tá hendi tað í Føroyum fyrstu ferð,
at tríburðar úr Dali komu vælskaptir í verð.
Ein genta og tveir dreingir vóru, Gunnar hann var fyrst.
So Hedvig og so Julian, teir vóru báðir minst.

Tað gingu síðan nøkur ár, so komu aftur trý.
Í sjeytitrý, á flatlandi tær vóru føddar í.
Men bygdin tann tær hoyra til, jú Vestmanna tað er,
tí Joan, Tina og Vivi barnaskógvar slitu her.

Enn einaferð í Vestmanna tað hendi undur stórt.
Ein genta og ein genta og ein drongur vóru fødd.
Ja Anna, Bjørt og Allan Jóhan, tey komu í hálvfems.
Hjá dreingi, millum gentur tvær, hann skikkar sær so pent.

Men áðrenn hetta árhundrað var farið aftur um bak
Í nýti átta og nýggju komu trý, og trý afturat
Í Fuglafirði dreingir har, so líkir eru teir.
Í Streymnesi gentur eru tvær og so ein drongur meir.

Í Streymnesi, Helena og Rebekka gentur tvær,
so Marius hann tímir ei at skjeldast við tær har.
At Teodor er tann elsti, tað so tíðuliga sæst,
tí Tórður og so Birgir geva honum altíð rætt.

At vera trý er stuttligt, men tó ikki altíð lætt.
Tað hevði verið gott um mamma, babba slætt og rætt,
ja líktust høgguslákki, átta armar høvdu tá,
So kundu vit øll somul altíð ligið teimum hjá.

Tað kundi verið so nógv sagt um tað at vera trý,
men sigast kann hjá okkum hevur eydnan verið blíð.
Tí bara tað at koma til í hesa stóru verð,
ein avbjóðing so stór hjá hvørjum fostri hetta er.

*Yrkt: Tove Jacobsen*





*(F.v.) Vivi, Tina og Joan úr Vestmanna. Foreldur teirra eru, Tove og Sámal Jákup í Vestmanna*



*Una og Ingolf Joensen úr Oyndarfirði eiga, Rebekku, Marius og Helenu. Tey eru búsitandi í Streymnesi*



*Í Vestmanna er serstakliga fruktagott. Í 1990 føddust á øðrum sinni tríburðar har. Hesa ferð vóru tað, Sarita og Jákup Martin Andreasen, ið vóru tey hepnu. (F.v.) Anna, Allan Jóhan og Bjørt úr Vestmanna*